# TILTØK

**Gudstænastur Hóskvøldið**
***Sambýlið á Heygnum:*** kl. 19.30 Hans Eiler Hammer

**Ólavsøkudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Patrick de Neergaard

**10. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Heri Joensen
***Kaldbak:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Eiði:*** kl. 10.40 Skriftamál, kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Leiti:*** kl. 12.00 Patrick de Neergaard
***Haldarsvík:*** kl. 11.00,
***Tjørnuvík:*** kl. 12.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11.00 Jógvan Fríðriksson
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, altarg., Elsa Funding
***Haraldssund:*** kl. 11.00 Niels Pauli Danielsen
***Árnafjørður:*** kl. 11.00, altarg., Hans Eiler Hammer
***Sandvík:*** kl. 12.00 Ólavur Rasmussen

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti, breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudags- og týskvøldsmøtini byrja aftur 14. august.
www.livdin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti*
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Sunnivu Poulsen. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Filadelfia, Havn**
Ólavsøkudag kl. 16.00 Lovsangur í Grasagarði.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, Tummas Jacobsen talar. Summarskúlin er undir taluni. Kl. 22.00 Útifundur á Vaglinum.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 214067.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Ólavsøkuaftan kl. 18.00 og 23.00 Útifundur á Vaglinum. Ólavsøkudag kl. 17.00 og kl. 22.30 Útifundir á Vaglinum. Leygardagin 30. juli kl. 11.00 Útifundur í gongugøtuni. Sunnudagin kl. 18.00 Evangeliskt møti í salinum.Vitjan av major Njál Djurhuus.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Ólavsøkuaftan kl. 20.00 Útimøti á Vaglinum.
Ólavsøkudag kl. 20.00 Útimøti á Vaglinum.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, Linda Petersen talar.
www.gospel.fo

**Meinigheitshúsið**
Ólavsøkuaftan kl. 18.00 Møti v/ Alfred Olsen, Alis Garðalíð syngur, kl. 23-04.00 Tey ungu hava opið hús við café, lovsangi og andakt.
Ólavsøkudag kl. 18.00 Møti v/ Regin Høgnesen, Tórhild Bjarkhamar syngur.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Niels Jacob Nielsen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Hósdagin kl. 21.00 Útimøti, kl. 22.30 Opið hús í Ebenezer. Fríggjadagin kl. 10.00 Møti í Ebenezer, Páll Poulsen talar. Kl. 21.00 Útimøti.
Leygardagin kl. 16.00 Barnamøti í Ebenezer, kl. 20.30 Ungdómsmøti í Lívdini.
Sunnudagin kl. 10.00 Ebenezer – breyðbróting, kl. 18 Ebenezer – evangel. møti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 18.00 Útimissiónsmøti, Maurin D. Clarke og Tom Skaale tala. Innsavnan til útimissión. Ábit aftaná møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Møti sunnukvøldið kl. 19.00 v/ Egil Joensen.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake v/ Paula Høj.
Sunnumorgunin kl. 11.00 Møti, ymisk luttøka við vitnisburði.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti við Vagn Foldbo. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Óla Hans Johannesen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin. www.fuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Innsavnan.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vikuskiftismøti verða leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00 við Johan Eli Johannesen, Ólavi Jacobsen o.ø., ið tala og syngja. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Anniku, Ebba og Ingibjørg.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Frá 4.–26. juli er Tilhaldið opið kl. 10.00–17.00.***
***27. juli er stongt vegna fyrireiking av Ólavsøkuframsýningini.***
***Á Ólavsøku verður ein framsýning av barnamyndum frá 1920–1945.***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 31. juli verður gongutúrur undir Rógvuna í Dalar. Bratt og illgongd í støðum. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum er í summarfrí frá 1. juli til 5. september 2005.** Tá verður spælistovan í Margarinfabrikkini.

**AA-fundir í Havn**
<u>Tinghúsvegur 37</u>
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
<u>Tinghúsvegur 37</u>
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Bláí Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

## Brúdleyp

Í dag, 28. juli kl. 15.00 giftast í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn Elsa Joan Durhuus úr Havn og Kent Johannesen úr Runavík. Adr.: Duevej 65, 3. tv. 2000 Frederiksberg.

Leygardagin tann 30. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Elin S. Joensen, Miðvágur og Tór-Ingar Akselsen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í SÍF-húsinum í Sandavági frá kl. 20.30.

Leygardagin 30. juli kl. 14.00 giftast í Betania í Skopun Davia Gertrud Nicolajsen, Skopun og Hans Jacob Reinert Petersen, Saltnes. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru vælkomin inn á gólvið hjá Arndis og Jógvan Hendrik Nicolajsen, Skopun, frá kl. 19.00.

Leygardagin 30. juli kl. 14.00 giftast í Mizpa á Eiði, Evi Jacobsen og Jógvan í Skorini. Veitslan verður fyri innbodnum í Studentaskúlanum á Kambsdali kl. 19.00.

Leygardagin 30. juli kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Fríðun Kristina Hansen, Argir og Meinhard Jacobsen, Toftir. Veitsluhald fyri innboðin verður á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Sunnudagin 31. juli kl. 15.00 giftast í Viðareiðis kirkju Jóhan Sjóstein av Viðareiði og Julianna O. W. Høgnesen úr Klaksvík. Vælkomst verður í heiminum eftir kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 6. august giftast í heiminum í Skopun Kathrina í Byrgi og Símun Martin Nicolajsen. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 19.30.

Leygardagin 6. august giftast í Sædding kirkju Tina Skipper Rasmussen, Esbjerg og Karstin Knudsen, ættaður av Skála. Adr.: Kunstpavillonen í Esbjerg.

Leygardagin 6. august kl. 15.00 giftast í Kegnæs kirkju Hansa M. Petersen, ættað av Skipanesi og Thorbjørn Thade Petersen, ættaður úr Ribe. Brúdleypsadr.: Shoven 9, 6470 Sydals, Kegnæs

Leygardagin 6. august giftast í Godthåb kirkju, Godthåb, Svenstrup, Helen Houmøller og Jens Rasmussen úr Kollafirði. Adressan er Kildevej 10, Godthåb, DK 9230 Svenstrup.

Leygardagin 6. august kl. 16.00 giftast í Havnar Kirkju Elinborg Mortensen og Niklas Samuelsen. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Malla Dam og Søren Hjarbæk Jensen. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

Leygardagin 6. august kl. 11.00 giftast í Berøa, Saltangará, Linda Jacobsen, Vatnsoyrar og Janus Kannuberg, Runavík. Høvi verður at heilsa uppá brúðarparið í Berøa millum kl. 13.00 og 17.00.

Leygardagin 13. august kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni, Rannvá Lind Helgadóttir, Vestmanna og Borgar Hansen, Nes. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449988, 424511, 584430 ella 504040 innan 1. august.

Fríggjadagin 19. august kl. 15.00 giftast í Ebenezer í Tórshavn, Rakul Andreassen, Tórshavn og Eyðfinn Olsen, Klaksvík. Veitsan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 5. august á tlf. 226922 ella 229516.

Leygardagin 3. september kl. 14.30 giftast í Vágs kirkju Vima Beck, Lopra og Bjarti Nattestad, Hvalba. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 373972, 504530, 375067 ella 314543 innan 14. august.

Leygardagin 24. september kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Anita Jarlesdóttir Arntsen úr Mikladali og Petur Juul Suni Jacobsen av Syðradali K. Døgurði verður í Skálanum fyri innbodnum kl. 17.30. Vælkomst verður eftir kl. 22.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga okkum frá innan 24. august á tlf. 458625, 274118 ella 258625.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 2. august hava Charlotta og John Thorsteinsson, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við vælkomst á Tekniska Skúla frá kl. 18.00.

Týsdagin 9. august hava Sanna og Bjørn Akselsen, Sandavágur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 6. august. Opið hús verður í meinigheitshúsinum í Sandavági frá kl. 15.00 til 21.00.

Týsdagin 9. august kunnu hjúnini Eydna og Bartal Kass, Argir halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 13. august. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið eru vælkomin í neystið – har borðreitt verður við stóra kalda borðinum – og verða vinarliga biðin um at boða frá á tlf. 316456 ella á tlf. 221310 innan 1. august.

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 6. august hava Elsa og Páll Horn verið gift í 50 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúdleypsparið eru hjartaliga vælkomin í B36-húsið leygardagin millum kl. 11.00 og 15.00.

## 80 ár

Sunnudagin 31. juli verður Dánjal Norðberg, Tórshavn, 80 ár. Opið hús verður heima í Brekkugøtu 6 frá kl. 12.00 til 18.00.